KRINGVARP FØROYA

# Ársfrásøgn 2016

*Frumrit*

# Innihaldsyvirlit

**Síða**

UPPLÝSINGAR UM STOVNIN 2

ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR 3

VÁTTANIR FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA 4

LEIÐSLUFRÁGREIÐING 5

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR 9

RAKSTRARROKNSKAPUR 2016, KRINGVARP FØROYA 13

FÍGGJARSTØÐA TANN 31. DESEMBER 2016, KRINGVARP FØROYA 14

NOTUR 15

KRINGVARP FØROYA

# Upplýsingar um stovnin

Kringvarp Føroya
Norðari Ringvegur
100 Tórshavn

Roknskaparár: 1. januar – 31. desember

## Kringvarpsstýri

Rúni Heinesen (formaður)
Hjalmar Hansen (næstformaður)
Kári Sólstein
Theodor E. D. Olsen
Katrin Petersen
Petur Elias Petersen
Gunvá við Keldu

## Stjórn

Dia Midjord
*stjóri*

## Grannskoðan

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f
Staravegur 17
FO-100 Tórshavn

KRINGVARP FØROYA

# Roknskaparátekning leiðslunnar

**Stýrið og stjórn hava í dag viðgjørt og viðtikið ársfrásøgnina fyri 2016 fyri Kringvarp Føroya.**

Ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við ásetingarnar í "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o. t."

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin í øllum týðandi lutum er í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o. t.".

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Tórshavn hin 7. juni 2017

Stjórn:

Dia Midjord
*stjóri*

Stýrið:

Rúni Heinesen
*formaður*

Hjalmar Hansen
*næstformaður*

Kári Sólstein

Theodor E. D. Olsen

Katrin Petersen

Gunvá við Keldu

Petur Elias Petersen

# Váttanir frá óheftum grannskoðara

## *Til kringvarpsstýrið*

## Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Kringvarp Føroya fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2016 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.". Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, herundir "Løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.". Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at stovnurin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.". Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin fyri 2016 gevur eina rættvísandi mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, hin 7. juni 2017

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
*statsaut. revisor*

# Leiðslufrágreiðing

Kringvarp Føroya hevur sambært kringvarpslógini skyldu til at kringvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Í programmvirkseminum skal Kringvarp Føroya leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.

Í public service sáttmála millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið eru almennu skyldur Kringvarpsins nágreinaðar. Eingin Public Service sáttmáli hevur verið í gildi seinastu 4 árini, men nú er nýggjur sáttmáli gjørdur, og er hann galdandi í 4 ár frá 1. januar 2017.

## Inntøkur

Inntøkurnar hækkaðu 4,9 mió.kr. í mun til árið fyri, úr knøppum 58 mió.kr. upp í knappar 63 mió.kr.

| Inntøkur kr. | 2016 | 2015 | munur |
|---|---|---|---|
| Kringvarpsgjald | 59.422.991 | 48.197.148 | 11.225.843 |
| Útvarpskunngerðir (í 2015 eru útvarpslýsingar við) | 2.712.853 | 4.840.400 | -2.127.547 |
| Ískoytisveitingar (í 2015 eru sjónvarpslýsingar við) | 466.204 | 1.459.398 | -993.194 |
| Spæl, netto inntøka | 120.424 | 3.157.252 | -3.036.828 |
| Annað | 158.468 | 260.093 | -101.625 |
| **Inntøkur tilsamans** | **62.880.940** | **57.914.291** | **4.966.649** |

Økta inntøkan frá kringvarpsgjaldi kemst av nýggja háttinum at skuldskriva og innkrevja kringvarpsgjald frá persónum, virkjum og almennum stovnum. Hinvegin hevur Kringvarp Føroya ikki longur inntøkur frá útvarps- og sjónvarpslýsingum. Netto hava hesar broytingar givið umleið 8 mió.kr. í meirinntøkum í 2016.

Samsvarandi roknskaparvegleiðingini um fremmanda fígging verða inntøkur frá eydnuspølum bert tiknar við í raksturin í tann mun, tær verða nýttar til at fíggja virksemi í árinum. Til tess at minka um óvissuna við spæliinntøkum er 2016 nýtt sum eitt skiftisár soleiðis, at inntøkur frá spølum í fyrsta lagi verða brúktar árið eftir, at tær eru vunnar. Tí eru bert 120 tkr. av spæliinntøkunum brúktar til at fíggja virksemið í 2016.

# Leiðslufrágreiðing

## Útreiðslur

Framleiðandi og stuðlandi deildirnar vóru 3,5 mió.kr. dýrari at reka enn árið fyri, harav er ein stórur partur sáttmálabundnar lønarhækkingar og umflokkingar.

| Útreiðslur kr. | 2016 | 2015 | munur |
|---|---|---|---|
| Beinleiðis útreiðslur | | | |
| Aktuelt/Tíðindadeildin | 11.372.106 | 11.012.460 | 359.646 |
| Heimasíða | 791.172 | 1.023.744 | -232.572 |
| Mentan/Programdeildin | 12.393.333 | 11.678.898 | 714.435 |
| Tøknideildin (framleiðsla) | 10.353.716 | 9.509.044 | 844.672 |
| Beinleiðis útreiðslur til samans | 34.910.327 | 33.224.146 | 1.686.181 |
| Óbeinleiðis útreiðslur: | | | |
| Umsiting | 8.042.174 | 7.356.854 | 685.320 |
| Tøknideildin (ikki framleiðsla) | 12.658.540 | 11.588.667 | 1.069.873 |
| Rættindi | 4.129.000 | 4.005.986 | 123.014 |
| Óbeinleiðis útreiðslur til samans | 24.829.714 | 22.951.507 | 1.878.207 |
| **Útreiðslur til samans** | **59.740.041** | **56.175.653** | **3.564.388** |

Afturat hesum koma íløgur, avskrivingar og fíggjarpostar, og ársúrslitið fyri 2016 er 0 kr. Tá eru 11,5 mió.kr. av spæliinntøkunum frá 2016 ikki tiknar við í raksturin, men støðlaðar í fíggjarstøðuni eftir reglunum um fremmanda fígging.

Samanumtikið kann sigast, at úrslitið hjá Kringvarpi Føroya fyri 2016 var gott.

## Hendingar í árinum

Árið í fjør eydnaðist væl. Umframt vanliga virksemi var árið merkt av m.ø. einari heilt nýggjari skipan at krevja inn kringvarpsgjald og einum kommunuvali í november.

Á sumri 2016 varð ein framleiðsluskipan tikin í brúk, sum kom ístaðin fyri fleiri eldri skipanir. Skipanin heldur stýr á vaktartalvum, arbeiðstímum, framleiðslum, kostnaðum o.ø., og hon er eitt hent amboð til at leggja virksemið hjá stovninum til rættis.

Fíggjarliga grundarlagið hjá Kringvarpi Føroya varð munandi broytt í 2016, tá innkrevjingin varð grundleggjandi broytt og løgd til TAKS at umsita. Størsta broytingin er, at gjaldsskyldan nú er tengd at persónum heldur enn húskjum.

Av hesum ávum eru arbeiðsuppgávurnar á stovninum fækkaðar, og eitt fólk færri starvast í umsitingini.

# Leiðslufrágreiðing

Aðrar broytingar hendu eisini á inntøkuøkinum. Kringvarp Føroya kann framhaldandi senda lýsingar í útvarpi og í sjónvarpi, men inntøkurnar frá hesum fara í landskassan.

Lýsingaøkið varð í hesum sambandi umskipað frá 1. apríl 2016. Meginbroytingin er, at Kringvarp Føroya hevur ikki longur atknýtt sølufólk at samskipa lýsingasøluna, tí stovnurin tekur nú bara ímóti liðugt framleiddum lýsingum.

Eitt drúgt rættarmál fekk ein enda, tá ið danska loyvisnevndin í rættargangsmálum avgjørdi, at mótparturin ikki slapp at royna málið í Hægsta rætti. Mótparturin hevur síðani goldið Kringvarpi Føroya endurgjaldsupphæddina, ið hann var dømdur at gjalda.

## Hendingar aftaná roknskaparárslok

Drúgva arbeiðið at út- og umbyggja Kringvarpshúsini er um at verða liðugt.

Landsverk handaði fyri kortum Kringvapi Føroya fyrsta og annað byggistig, ein framleiðslubygning, eina umsitingarlon og eina forhøll.

Hølini verða tikin í nýtslu, tá ið tøkniligar innlegginar, útgerð og innbúgv er fingið til vega. Stovnurin má gjalda ta milliónaupphædd hetta kemur at kosta, tí játtan til hendan partin var ikki við í byggiverkætlanini.

## Verkætlanin SavnsGull

Verkætlanin SavnsGull, sum fer fram í samstarvi við Søvn Landsins, fær árliga 900 tkr. á fíggjarlógini. Higartil er játtanin brúkt til at talgilda útvarpsbond og tíðindi, sum eru goymd á pappíri. Verkætlanin, sum hevur egnan stýrisbólk og egið stovnsnr. í Búskaparskipan Landsins, er ikki tikin við í ársroknskapin fyri Kringvarp Føroya.

Verkætlanin hevur gjørt nakrar royndir við at talgilda sjónvarpsbond, men serligur førleiki og útgerð krevst til henda partin, tí elstu sjónvarpsbondini eru rættiliga illa farin.

Á sumri 2016 sendi SavnsGull umsókn til A. P. Møller at vita, um grunnurin var sinnaður at hjálpa til at rinda, so verkætlanin kundi víðkast til eisini at fevna um arbeiðið at talgilda sjónvarpsbond.

Grunnurin hjá A. P. Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møller til almenn endamál játtaði í november 2016 fimm mió.kr. til at talgilda sjónvarpspartin.

Stuðulin kemur verkætlanini væl við, og nú Kringvarp Føroya eisini hevur latið verkætlanini meira arbeiðsorku, verður mett, at alt tilfarið í verkætlanini SavnsGull er liðugt talgilt í 2021.

# Leiðslufrágreiðing

## Framtíðin

Broytta kringvarpsgjaldið og umskipaða innkrevjingin hevur ført við sær, at inntøkurnar hjá Kringvarpi Føroya eru komnar í eina meira trygga legu.

Tað hevur eisini stóran týdning, at stovnurin kann spara saman inntøkur frá eydnuspølum, og eftir tørvi brúka pengarnar til virksemið seinni. Hetta betrar um møguleikarnar at tilrættisleggja og gera langtíðar raðfestingar.

# Nýttur roknskaparháttur

## Inngangur

Ársfrásøgnin fyri Kringvarp Føroya fyri 2015 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir somu roknskaparreglum sum undanfarna ár. Við árslok 2015 var tøkniligur útbúnaður ikki innroknaður í fíggjarstøðu Kringvarpsins í samsvari við kunngerðina um roknskaparverk landsins. Hetta verður mett sum ein týðandi feilur, og tískil eru gjørdar rættingar í samanberingartølunum og eginognini hesum viðvíkjandi. Rættingin hevur ført við sær, at eginognin við ársenda í 2015 er hækkað við 3.826 og við ársenda 2016 við 2.980 tkr. Materiell støðisogn verður ikki avskrivað yvir raksturin, og broytingin hevur tískil onga ávirkan á ársúrslitini.

# Rakstrarroknskapurin

## Inntøkur og útreiðslur

Inntøkur og útreiðslur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum, verða skrásettar, tá ið tær eru latnar.

Í teimum førum, tá útreiðslur ella inntøkur ikki stava frá vørum og tænastuveitingum, verða tær skrásettar, so skjótt upphæddin kann gerast upp, og í seinasta lagi, tá ið goldið verður. Ein upphædd kann gerast upp, um eitt rættarligt krav eftir eini væl greinaðari upphædd kann gerast galdandi. Um eitt munandi krav, sum er til eitt ávíst fíggjarár, ikki kann gerast endaliga upp, áðrenn roknskaparárið er lokið, verður upphæddin skrásett á einari rakstrarkontu í roknskapinum fyri tað fíggjarárið, grundað á eina meting, soleiðis at upphæddin verður rættað í tí fíggjarári, tá ið kravið endaliga kann verða gjørt upp.

## Inntøkur av eydnuspølum

Spæliinntøkur verða viðgjørdar sum fremmand fígging, sambært § 13, stk. 5 í roknskaparkunngerðini. Skipanin við fremmandu fíggingini av spæliinntøkum hjá Kringvarpinum virkar á tann hátt, at tað sum er eftir at fíggja – tá ið hædd er tikin fyri vanligu inntøkunum frá kringvarpsgjaldi kunngerðum o.ø., og møguligari játtan – verður fíggjað av fremmandu fíggingini, um upphædd er á kontuni, sum verður tikin við á fíggjarstøðuni undir skuld. Uppsparda upphæddin til fremmanda fígging kann verða samansavnað eftir einum ella fleiri árum, og kann nýtast eftir einum ella fleiri árum.

# Nýttur roknskaparháttur

Fremmanda fíggingin er tískil ein restfígging, sum er treytað av tveimum viðurskiftum:

1. At fígging vantar í til raksturin av Kringvarpinum, tá ið ársins kringvarpsgjald, aðrar inntøkur og møgulig játtan eru nýttar. Í hesum liggur eisini, at vanligu inntøkurnar og játtan ikki kunnu samansavnast á kontu fyri fremmandari fígging á fíggjarstøðuni.

2. At spæliinntøkur eru tøkar á fíggjarstøðuni, t.v.s. at tað er ein uppspard upphædd á fíggjarstøðuni til fremmanda fígging. Kringvarpið má tí taka við, hvussu stórar samansavnaðu tøku spæliinntøkurnar eru og væntandi verða, tá ið fleirársætlanir fyri virksemið verða lagdar. Tað kann ongantíð verða flutt meira til raksturin av kontu fyri fremmandari fígging, enn upphæddin á kontuni, t.v.s. at kontan fyri fremmanda fígging ongantíð kann koma í trot.

## Fíggjarstøðan

### Materiell støðisogn

Íløgur og størri viðlíkahald, sum er ein betring av verandi støðisogn, verður eins og vanligt viðlíkahald útreiðsluført í rakstrarroknskapinum.

Materiell støðisogn, hvørs keypsvirði er yvir 75 tkr., verður skrásett sum materiell støðisogn og ein samsvarandi mótkonta verður skrásett beinleiðis undir eginognini. Materiella støðisognin verður upptikin til kostprís við frádrátti av avskrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði:

| | Brúkstíð |
|---|---|
| Bygningar | 50 ár |
| Tøkniligur útbúnaður | 3-10 ár |
| Akfør | 7 ár |

Avskrivingarnar hava onga ávirkan á raksturin, við tað at talan er um tekniskar avskrivingar.

Niður- ella uppskrivingar av skrásettari materiellari støðisogn verða skrásettar, um tað kann staðfestast, at roknskaparliga virðisbroytingin á støðisognini er varandi. Talan er um eina roknskaparliga skráseting, sum ikki ávirkar rakstrarroknskapin.

Støðisogn í gerð verður ikki skrásett í ársroknskapinum. Samlaða íløgan verður í staðin skrásett sum tilgongd, tá materiella støðisognin er liðug og tikin í brúk.

# Nýttur roknskaparháttur

## Goymsla

Eins og undanfarin ár, er virðið á vørugoymsluni ikki tikið við á goymslukontu í fíggjarstøðuni, við tað at játtanarheimild ikki er til tess.

## Vøru- og tænastuáogn

Vøru- og tænastuáogn verður virðisásett til amoritseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum.

## Onnur áogn

Onnur áogn fevnir um áogn hjá starvsfólkum og meirvirðisgjald.

## Millumrokningar

Stuttfreistað skuld hjá Kringvarp Føroya til Gjaldstovuna fevnir um millumrokning vegna peningaflytingar, sum Gjaldstovan hevur gjørt vegna Kringvarp Føroya.

## Onnur skuld

Onnur skuld verður virðissett til nettorealisatiónsvirði og fevnir um skyldugar vinningar í sambandi við spøl, afturhildnan skatt í sambandi við spøl, skyldugan starvsfólkakostnað og annan skyldugan kostnað.

## Støðlað avlop

Støðlað avlop verður virðissett til nettorealisatiónsvirði og fevnir um avlop frá eydnuspølum.

Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan meta, at spæliinntøkurnar hjá Kringvarpi Føroya kunnu sammetast við fremmanda fígging, sambært §13, stk. 5 í roknskaparkunngerðini:

> Inntøkur av verkætlanum o. t. - sum rætturin til at taka ímóti, er treytaður av, at ávíst virksemi verður framt - verða tiknar við sum inntøka so hvørt, sum peningurin verður nýttur til ætlaða endamálið.

Uppspard upphædd frá fremmandari fígging kann verða samansavnað eftir einum ella fleiri árum, og kann nýtast eftir einum ella fleiri árum.

# Nýttur roknskaparháttur

## Avsettar skyldur

Avsettar skyldur verða tiknar við í ársroknskapin, tá ið ein bindandi hending er farin fram, og skyldan er sannlík, men óvist er, nær upphæddin fellur til gjaldingar, ella hvussu stór upphæddin er. Nýtslan av avsettum skyldum verður javnað, tá ið skyldan kann gerast endaliga upp, og skyldan verður útint.

Samsvarandi nýttum roknskaparhátti í landsroknskapinum verða skyldugar starvsfólkaskyldur ikki tiknar við í ársroknskapin uttan so, at tað ikki er óvist, nær upphæddin fellur til gjaldingar og hvussu stór upphæddin er. Skyldug avspáking verður tikin við sum ein skylda undir aðrari skuld.

# Rakstrarroknskapur 2016, Kringvarp Føroya

## KRINGVARP FØROYA

| Nota | | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 62.880.940 | 57.914.291 |
| 2 | Framleiðandi deildir | -34.910.327 | -33.224.146 |
| 3 | Stuðlandi deildir | -20.700.714 | -18.945.521 |
| 4 | Annar kostnaður | -4.129.000 | -4.005.986 |
| | **Úrslit áðrenn rentur, avskrivingar og íløgur** | **3.140.899** | **1.738.638** |
| | Íløgur og størri viðlíkahald | -3.948.344 | -3.367.134 |
| | Avskrivingar og avsetingar av skuldarum | 812.248 | -695.779 |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **4.803** | **-2.324.275** |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 0 | 6.442 |
| | Aðrir fíggarligir kostnaðir | -4.803 | -6.141 |
| | **Úrslit áðrenn støðling av avlopi** | **0** | **-2.323.974** |
| | Afturført støðlað avlop frá 2014 | 0 | 2.323.974 |
| | **Ársúrslit** | **0** | **0** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2016, Kringvarp Føroya

KRINGVARP FØROYA

| Nota | OGN | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | Grundøki | 3.183.768 | 3.183.768 |
| | Bygningur | 8.243.168 | 8.243.168 |
| | Tøkniligur útbúnaður | 7.980.047 | 8.826.636 |
| | Akfør | 27.143 | 131.236 |
| | **Materiel støðisogn til samans** | **19.434.126** | **20.384.808** |
| | Millumrokning við Gjaldstovuna | 14.794.964 | 3.321.469 |
| 5 | Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar | 1.946.091 | 2.380.672 |
| 6 | Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald | 3.781.094 | 3.262.178 |
| 7 | Onnur áogn | 912.822 | 693.988 |
| | **Áogn til samans** | **21.434.971** | **9.658.307** |
| 8 | Tøkur peningur | 584.994 | 919.131 |
| | **Ogn í umferð til samans** | **22.019.965** | **10.577.438** |
| | **Ogn til samans** | **41.454.091** | **30.962.246** |

| Nota | SKYLDUR | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | Eginogn við ársbyrjan | -4.340.040 | -4.340.040 |
| | Mótkonta, bygningur | 8.243.168 | 8.243.168 |
| | Mótkonta, onnur materiel støðisogn | 11.190.958 | 12.141.640 |
| | Mótkonta, upphædd á StRk. 0360 | 4.340.040 | 4.340.040 |
| | Ársúrslit áðrenn støðling | 0 | -2.323.974 |
| | Flutt til/frá Strk. 0881 | 0 | 2.323.974 |
| | **Eginogn til samans** | **19.434.126** | **20.384.808** |
| | **Stuttfreistað skuld** | | |
| | Millumrokning við Gjaldstovuna | 0 | 0 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 0 | 0 |
| 9 | Onnur skuld | 4.382.280 | 4.424.195 |
| 10 | Fremmand fígging | 17.637.685 | 6.153.243 |
| | **Stuttfreistað skuld til samans** | **22.019.965** | **10.577.438** |
| | **Skyldur til samans** | **41.454.091** | **30.962.246** |

Ognir, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuni (nota 11)

Skyldur, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuni (nota 12)

# Notur

1

| Inntøkur | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| Kringvarpsgjald | 59.422.991 | 48.197.148 |
| Útvarpskunngerðir (í 2015 eru útvarpslýsingar við) | 2.712.853 | 4.840.400 |
| Ískoytisveitingar (í 2015 eru sjónvarpslýsingar við) | 466.204 | 1.459.398 |
| V4-spælið, netto | -29.690 | 202.518 |
| Gekkaspælið, netto | 150.114 | 2.954.734 |
| Aðrar inntøkur | 158.468 | 260.093 |
| **Inntøkur til samans** | **62.880.940** | **57.914.291** |

| V4-spælið, netto | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| Inntøkur | 381.612 | 527.325 |
| Lønir, samsýningar og lønartengdar útreiðslur | -176.380 | -175.954 |
| Aðrar útreiðslur | -234.922 | -148.853 |
| **V4-spælið, tikið við sum rakstrarinntøka í árinum** | **-29.690** | **202.518** |

| Gekkaspælið, netto | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| Inntøkur | 20.623.199 | 10.525.440 |
| Lønir, samsýningar og lønartengdar útreiðslur | -451.113 | -446.735 |
| Aðrar útreiðslur | -8.537.530 | -5.690.857 |
| **Nettoúrslit í árinum** | **11.634.556** | **4.387.848** |
| Partur av inntøku í árinum, sum er støðlað á kontu fyri fremmandari fígging | -11.484.442 | -1.433.114 |
| **Gekkaspælið, tikið við sum rakstrarinntøka í árinum** | **150.114** | **2.954.734** |

# Notur

| 2 Framleiðandi deildir | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| **Aktuelt/Tíðindadeildin:** | | |
| Lønir og samsýningar | 10.978.676 | 10.306.175 |
| Vørur og tænastur | 393.430 | 706.285 |
| **Aktuelt/Tíðindadeildin til samans** | 11.372.106 | 11.012.460 |
| **Heimasíða:** | | |
| Lønir og samsýningar | 683.812 | 991.044 |
| Vørur og tænastur | 107.360 | 32.700 |
| **Heimasíða til samans** | 791.172 | 1.023.744 |
| **Mentan/Programmdeildin:** | | |
| Lønir og samsýningar | 10.265.693 | 10.108.101 |
| Vørur og tænastur | 2.127.640 | 1.570.797 |
| **Mentan/Programmdeildin til samans** | 12.393.333 | 11.678.898 |
| **Tøknideildin (framleiðsluparturin):** | | |
| Lønir og samsýningar | 9.909.241 | 8.947.592 |
| Vørur og tænastur | 444.475 | 561.452 |
| **Tøknideildin (framleiðslupartur) til samans** | 10.353.716 | 9.509.044 |
| **Framleiðandi deildir til samans** | **34.910.327** | **33.224.146** |

# Notur

| 3 Stuðlandi deildir | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| **Umsitingin:** | | |
| Lønir | 4.888.185 | 4.797.981 |
| Vørur og tænastur | 3.153.989 | 2.558.873 |
| Umsitingin til samans | 8.042.174 | 7.356.854 |
| | | |
| **Tøkni deildin (ikki framleiðslupartur):** | | |
| Lønir og samsýningar | 4.682.237 | 4.715.848 |
| Vørur og tænastur | 3.466.402 | 2.791.526 |
| Samskiftiskostnaður | 998.655 | 1.042.237 |
| Húsakostnaður | 3.002.439 | 2.612.668 |
| Rakstur av akførum | 508.807 | 426.388 |
| Tøkni deildin til samans | 12.658.540 | 11.588.667 |
| | | |
| **Stuðlandi deildir til samans** | **20.700.714** | **18.945.521** |

| 4 Annar kostnaður | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| Kostnaður fyri rættindi | 4.129.000 | 4.005.986 |
| | | |
| **Annar kostnaður til samans** | **4.129.000** | **4.005.986** |

| 5 Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| Áogn, brutto | 2.170.354 | 3.083.914 |
| Avsett móti væntaðum tapi | -224.263 | -703.242 |
| **Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar til samans** | **1.946.091** | **2.380.672** |

# Notur

| 6 Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| Áogn, brutto | 7.813.094 | 8.262.178 |
| Avsett móti væntaðum tapi | -4.032.000 | -5.000.000 |
| **Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald til samans** | **3.781.094** | **3.262.178** |

| 7 Onnur áogn | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| Meirvirðisgjald | 488.189 | 0 |
| Depositum | 76.082 | 76.082 |
| Lønarendurgjøld | 134.437 | 0 |
| Tíðaravmarkingar og onnur áogn | 214.114 | 617.906 |
| **Onnur áogn til samans** | **912.822** | **693.988** |

| 8 Tøkur peningur | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| BankNordik | 322.448 | 442.087 |
| Eik Banki | 119.734 | 270.269 |
| Norðoya Sparikassi | 54.891 | 18.553 |
| Suðuroyar Sparikassi | 85.921 | 186.177 |
| Kassapeningur | 2.000 | 2.045 |
| **Tøkur peningur til samans** | **584.994** | **919.131** |

| 9 Onnur skuld | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| Meirvirðisgjald | 0 | 173.025 |
| Skyldugar lønir | 229.637 | 0 |
| Skyldug avspáking | 1.118.300 | 989.600 |
| Skyldugt frítíðarískoyti | 327.000 | 331.000 |
| Skyldur í sambandi við eydnuspøl | 1.683.117 | 1.943.739 |
| Upphavsrættargrunnur | 131.226 | 109.742 |
| Tíðaravmarkingar | 893.000 | 877.089 |
| **Onnur skuld til samans** | **4.382.280** | **4.424.195** |

# Notur

10

| Fremmand fígging | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| Støðlað við ársbyrjan | 6.153.243 | 7.044.103 |
| Tilgongd í árinum | 11.604.866 | 4.590.366 |
| Frágongd í árinum | -120.424 | -5.481.226 |
| **Støðlað/fremmand fígging tilsamans** | **17.637.685** | **6.153.243** |

| Tilgongd í árinum | | |
|---|---|---|
| Inntøkur V4-spælið, netto | -29.690 | 202.518 |
| Inntøkur gekka-spælið, netto | 11.634.556 | 4.387.848 |
| **Tilgongd tilsamans** | **11.604.866** | **4.590.366** |

| Frágongd í árinum | | | |
|---|---|---|---|
| Flutt til rakstur, restfígging | | 120.424 | 3.157.252 |
| **Brúkt av avlopi frá 2014:** | | | |
| Aktuelt og kjak | 0 | | |
| Børn og ung | 0 | | |
| Undirhald | 0 | | |
| Útgerð, tøkni og heimasíða | 0 | | |
| Onnur endamál | 0 | 0 | 2.323.974 |
| **Frágongd tilsamans** | | **120.424** | **5.481.226** |

| Sundurgreinaðar saldur | Eydnuspøl 2014 | Eydnuspøl seinni ár | Saldur tilsamans |
|---|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan 2016 | 4.720.129 | 1.433.114 | 6.153.243 |
| Tilgongd í 2016 | 0 | 11.604.866 | 11.604.866 |
| Frágongd í 2016 | 0 | -120.424 | -120.424 |
| **Salda við ársenda 2016** | **4.720.129** | **12.917.556** | **17.637.685** |

Inntøkur frá eydnuspølum vórðu á fyrsta sinni støðlaðar sum fremmand fígging í fíggjarárinum 2014. Í roknskapinum fyri 2014 varð støðlaða upphæddin tikin við sum inntøka í rakstrinum, og flutt á kontuna fyri fremmanda fígging í fíggjarstøðuni sum eitt avlop. Frá og við 2015 verða inntøkur frá eydnuspølum bert inntøkuførdar í rakstrinum í tann mun, tørvur er á tí, sum restfígging. Upphæddin viðvíkjandi 2014, sum longu er inntøkuførd eina ferð, verður afturførd so hvørt, sum brúkt verður av henni, og hon verður skrásett í rakstrinum sum ein sjálvstøðugur postur áðrenn ársúrslitið.

# Notur

## 11 Ognir, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuna

Bygningur, tøkniligur útbúnaður og akfør, ið hava virðið omanfyri 75 tkr., eru skrásett sum materiell støðisogn í fíggjarstøðuni. Av hesum eru 3,0 mió.kr. bert við í fíggjarstøðuni í ársroknskapinum, men ikki í fíggjarstøðuni í Búskaparskipan Landsins (2015: 3,8 mió.kr). Hetta verður rættað í 2017, soleiðis at samsvar verður millum skrásetingar í ársroknskapi og Búskaparskipan Landsins.

## 12 Skyldur, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuna

Skyldug restferia frá innvinningarárinum 2015/2016 er við árslok 2016 gjørd upp til 1,0 mió.kr. (2014/2015: 0,8 mió.kr.).

Harumframt hava starvsfólk í roknskaparárinum 2016 vunnið rætt til feriu at halda í frítíðarárinum 2017/2018. Av hesari skyldu eru 0,3 mió.kr. tiknar við í fíggjarstøðuna, svarandi til skyldugt frítíðarískoyti, ið er innvunnið í tíðarskeiðinum 1. apríl – 31. desember 2016.